





# Írski sonurin leitar spentur til Føroya

**– Eg havi verið í næstan øllum londunum í heiminum, men eg havi ongantíð verið í Føroyum. Og um fólk í Føroyum vilja hoyra mín tónleik, so vil eg eisini spæla fyri teimum. Tað hevur einki at siga, hvussu stórt ella lítið eitt land er. Eg vil fegin sleppa til Føroyar at spæla, sigur írska poppstjørnan Brian McFadden, sum spælir í Klaksvík í august mánaði**

**Tónleikur**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Nibe:** Brian McFadden var stóra stjørnan á Nibe Festivalinum, sum hevur verið seinastu dagarnar. Hóast nógvir kendir danskir bólkar spældu á festivalinum, so var áhugin heilt serligur fyri teirri írsku poppstjørnuni.

Forvitin pressufólk, smílandi børn, skríggjandi gentur og lunkaðir menn vildu øll sleppa fram at Brian McFadden, og var hann í nánd av fólki, var neyðugt at hava vaktarmenn rundan um hann, so at hann ikki varð skræddur sundur.

McFadden spældi við sínum egna bólki á Nibe Festivalinum, og framførslan var góð. Hann spældi sangir av sínari seinastu útgávu – sangir sum Real To Me, Almost Here, Irish Son og Demons – og hann treiv eisini í nakrar av teimum kendu sangunum hjá Westlife, har McFadden í nógv ár var ein av sangarunum.

## Ein tápuligur írí í húgvu

Framførslan hjá Brian McFadden í Nibe byrjaði eitt sindur varisliga, men hann spældi seg av álvara heitan. Eitt skemtingarsamt írskt lyndi skein ígjøgnum, tá ið hann tosaði um veðrið, seg sjálvan og áhoyrararnar.

– Tú mást verða ein tápuligur íri fyri at ganga í einari húgvu í dag, segði McFadden um seg sjálvan, meðan hann kundi síggja fleiri túsund léttklødd fólk lurta eftir sær í tí brennandi sólskininum.

Bólkurin hjá McFadden spældi og sang væl, og sangirnir, sum McFadden hevur skrivað sjálvur og saman við øðrum, standa seg væl á eini slíkari poppkonsert. Tað er ein annar broddur í tónleikinum hjá honum, enn tað er hjá Westlife, men tann fangandi og melodiøsi poppurin er á onkran hátt í familju, hóast tónleikurin hjá McFadden ikki er so poleraður sum hjá Westlife.

## Gav sær tíð til føroyingar

Eftir framførsluna hitti Brian McFadden onkrar fjepparar, sum høvdu fingið møguleikan at práta við hann, og hann tosaði eisini eina løtu við fjølmiðlafólk.

Tá ið tey føroysku fjølmiðlafólkini sloppu fram at McFadden, gav hann sær serliga góðar stundir til at tosa og svara spurningum. Fyrikomandi og fryntligur gav hann sær tíð til at práta, hóast hann mundi havt fingið onkrar av spurningunum meira enn einaferð áður.

– Orsøkin til, at eg gavst í Westlife var, at alt skuldi snúgva seg fyrst og fremst um Westlife. Familja, vinir og alt annað kom í aðru røð, og tað vildi eg ikki meira. Nú eri eg nógv meira fríur og fái betur familju og arbeiði at passa saman.

– Um eg ikki havi hug at spæla eina konsert ávísan dag, so spæli eg ikki. Soleiðis var ikki í Westlife, tí har vóru vit so nógvir sangarar, og vit kundu ikki avgera nakað sjálvir.

– Nú koma familja og vinir í fremstu røð, og so kemur tónleikurin. Tað er ein stórur munur á hesum,



*– Eg veit, at Føroyar liggja langt norðan fyri Írland, og eg havi hoyrt, at allir føroyingar hava írskt blóð, so mær dámar Føroyar longu nú. Tit eru øll írar, nei, kanska eru vit allir føroyingar, sigur McFadden*